Eitt kjarnorkukríggj millum India og Pakistan:

# Kann kosta 12 mió. mannalív longu tann fyrsta dagin

**Kanningar hjá amerikanskum hernaðarmyndugleikum vísa, at eitt kjarnorkukríggj millum grannalondini India og Pakistan kann kosta meiri enn 12 milliónir mannalív longu tann fyrsta dagin**

*Pakistanski forsetin, Pervez Musharaf, hevur fleiri ferðir sagt, at land hansara vil ikki hava kríggj, men at Pakistan fer at svara øllum indiskum álopum aftur*

*Mynd: Reuter*

INDIA/PAKISTAN
*Árni Joensen*

Ein frágreiðing, sum amerikanskir hernaðarserfrøðingar hava skrivað, og sum verjumálaráðið Pentagon hevur staðfest, kemur til ta niðurstøðu, at brestur kjarnorkukríggj á millum India og Pakistan, kunnu meiri enn 12 milliónir fólk lata lív longu tann fyrsta dagin.

Umframt hesi fara nógv fólk at doyggja av geiðslavirknari dálking. Amerikanska frágreiðingin sigur, at taliðá teimum, sum gerast sjúk av geiðslingini, verður so stórt, at øll sjúkrahúsini í teimum báðum londunum verða fylt eftir stuttari tíð. Herumframt verður neyðugt við sera umfatandi altjóða hjálp beinanvegin.

– Í veruleikanum verða avleiðingarnar so umfatandi, at ikki bert sjúkrahúsini í India og Pakistan verða full av sjúklingum, men at hetta eisini verður galdandi fyri sjúkrahúsini í Miðeystri og Landssynningsasia. Amerikanska hermegin fær einki gjørt uttan at veita offrunum neyðuga hjálp og at rudda aftan á kríggið, stendur í frágreiðingini.

Ein talsmaður hjá Pentagon segði við New York Times mánadagin, at hungursneyð, umfarssóttir og trupulleikar við geiðslavirknum avfalli fara at krevja sera umfatandi hjálp frá altjóða samfelagnum. Hildið verður, at umleið sjey milliónir fólk verða særd, gera tey bæði londini av at nýta síni kjarnorkuvápn.

## Sum Hiroshima-bumban

Tað er ógreitt, hvussu nógvar kjarnorkuløðingar India og Pakistan hava. Amerikanska verjumálaráðið vil ikki upplýsa tílíkt alment, men hildið verður, at Pakistan hevur minst umleið 25 løðingar og India munandi fleiri.

Í einari grein í bretska blaðnum The Guardian týsdagin søgdu pakistanskir kjarnorkuserfrøðingar, at Pakistan hevur útbygt sína kjarnorkuermegi munandi tey seinastu trý árini, og at landið ivaleyst hevur væl fleiri kjarnorkuløðingar, enn higartil hevur verið nevnt. Teir søgdu eisini, at hvør løðing hevur umleið somu megi sum bumban, sum amerikanarar sleptu niður yvir Hiroshima í 1945. Løðingarnar kunnu tveitast niður úr flogførum ella sendast við rakettum.

Seinastu dagarnar hevur pakistanska hermegin gjørt tríggjar rakettroyndir. Hetta eru rakettir, sum kunnu bera kjarnorkuløðingar, og sum røkka so mikið langt, at tær bera til indiskar stórbýir sum Dehli og Bombay. Sambært teimum serkønu hevur indiska hermegin kjarnorkuløðingar við ymiskari megi, og eisini hesar løðingarnar kunnu kunnu sendast við rakettum ella sleppast niður úr flogførum.

## Ikki so nógv

Ein frágreiðing, sum lærdi háskúlin í Princeton í USA hevur gjørt, kemur eisini til ta niðurstøðu, at eitt kjarnorkukríggj millum India og Pakistan fer at krevja nógv mannalív, men tølini eru kortini ikki so stór sum í hinari frágreiðingini. Í Princeton halda serfrøðingarnir, at nýta londini tíggju prosent av sínari kjarnorkumegi, fer tað at kosta 1,7 milliónum indarum og 1,8 milliónum pakistanum lívið. Herumframt verða ávikavist 900.000 og 600.000 særd.

Tølini í hesari frágreiðingini byggja á, at londini nýta kjarnorkuvápnini ímóti teimum størstu býunum hjá hvør øðrum. Í India er talan um býirnar Bangalore, Bombay, Calcutta, Madras og Dehli, og pakistansku býirnir eru Faisalabad, Islamabad, Karachi, Lahore og Rawalpindi.

*Fleiri hava roynt semju millum India og Pakistan. Her tosar ES-kommiserurin Chris Patten við indiska uttanríkisráðharran, Jaswant Singh, um kreppuna*

*Mynd: Reuter*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi, abbi, langabbi og svágur okkara

**Petur Bjarnastein**
f. 22.12.1913

andaðist á Landssjúkrahúsinum 29. mai 2002, 88 ára gamal.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

*fyri tey avvarðandi*
**Magda, Bjarni, Finn og Regin**

*Kendi skotski rokkbólkurin Runrig fer at spæla á konsert saman við føroysku Týr á Listastevnuni 2002*

Listastevnan 2002:

# Fyrsta almenna stigið tikið

**Listastevnan 2002, sum fer av bakkastokki tann 3. august, hevur nógv áhugaverd og fjølbroytt tiltøk á skránni. Forsølan til Listastevnuna byrjar longu í morgin, leygardagin, har møguleiki verður at ogna sær atgongumerki til fýra tey størstu tiltøkini á stevnuni**

LISTASTEVNA 2002
*Ingrid Bjarnastein*

Kvæði, rokkur, sjónleikur, klassiskur tónleikur, gittartónleikur, opera, filmur, fyrilestrar og mangt, mangt annað er á skránni á Listastevnuni 2002.

Fyriskipararnir hava veruliga spílað seg út, hvat hesi fjølbroyttu skrá viðvíkur. Nógvar fyrireikingar hava verið gjørdar, og byrjar alt so við og við at koma undir land nú, bert tveir mánaðar áðrenn skal setast.

Birgir Kruse er formaður fyri Listastevnuna 2002, og hevur hann saman við hinum fyriskiparunum nógv at bjóða uppá.

– Forsølan til fýra tey mest spennandi tiltøkini byrjar longu leygardagin. Her er talan um Sequentia, sum kemur allan tann langa vegin úr New York, sum kemur at framføra Edda, kvæðir úr Íslandi við nøkrum teimum elstu norrønu tekstunum, sum til eru. Teir framføra nakað operalíknandi, og tey ein tann best umtókti renaissancetónleikabólkurin, greiddi Birgir Kruse frá á tíðindafundi hósmorgunin.

Hini tiltøkini eru ein operakonsert við millum øðrum Ernst Sondum Dalsgaard, ein rokk-konsert við Runrig úr Skotlandi og okkara egnu Týr og síðani eisini ein a capella sangbólkur, The Real Group, úr Svøríki.

Runrig er ein vælumtóktur bólkur í Skotlandi, tjóðskaparsinnaður og tveir av limunum eru politiskt aktivir. Eitt eyðkenni hjá bólkinum er, at teir enda altíð konsertir sínar við at spæla Loch Lomond, sum ein og hvør, ið veit eitt sindur um Skotland, kennir. Saman við Runrig fer Týr eisini at spæla. Týr komu uppá hægstu hitt-tindarnar í Føroyum við Orminum Langa, og fara teir á hesi konsertini at spæla Ólav Riddararós eisini. Teir vísa aftur til okkara felags norrøna mentanararv við hesum nýggja nýskapandi tónleiki.

*Framhald á síðu 4*